# Nógv fólk á bústevnu í Runavík

**- Nú verður ein eftirmeting gjørd, sum fer at vísa, um bústevnan, Hús og Innbúgv 2003, verður eitt afturvendandi tiltak ella ikki, sigur Hans Petur Ellingsgaard**

BÚSTEVNAN
*Vilmund Jacobsen*

Nógv arbeiði stendst av at fyrireika og rigga til eina so stóra sølustevnu sum hana, ið seinasta vikuskiftið var í Ítróttarhøllini í Runavík. Alt skal fáast at hanga saman til røttu tíðina, og tá ið latið verður upp, skulu helst eingir – ella minst møguligir – snøklar hanga eftir, sum ikki eru komnir uppá pláss.

Slíkar fyrireikingar taka drúgva tíð.

Men tað eru ikki bara fyrireikararnir, sum hava tað strævið teir dagar, stevnan varar. Tað er eisini strævið at vera tann ella tey, sum skulu sýna fram sítt útboð. Nógv koyring og langir dagar á básinum, og tá ið so seinasti tímin á sølustevnuni er komin, er tíð at hugsa um at rigga av og fáa vøruna í hús aftur. Onkur er væl nøgdur, vónandi tey flestu; onnur spyrja seg sjálvi, um hetta nú var stríðið vert.

Samstundis, sum hetta eru strævnir dagar, eru teir vanliga eisini hugnaligir – og ikki sørt spennandi. Tú møtir nógvum fólki. Summi koma av forvitni, onnur tí tey leita eftir tí, sum júst tú hevur at bjóða.



*Eitt stórt og væl fyriskipað tiltak í ítróttarhøllini í Runavík. - Eg haldi, at tiltakið sum heild eydnaðist til fulnar, sigur Hans Petur Ellingsgaard, ein av fyrireikarunum.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*50 framsýnarar á 45 básum vóru við á bústevnuni, Hús og Innbúgv 2003.*
*- Nú verður ein eftirmeting gjørd, sum fer at vísa, um tiltakið verður endurtikið, siga stigtakararnir.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Eydnaðist væl

Mánamorgunin hitti Sosialurin ein av fyrireikarunum til bústevnuna, Hús og Innbúgv, Hans Petur Ellingsgaard.

Hann sigur, at enn er ikki endaliga uppgjørt, hvussu tiltakið hevur vignast fíggjarliga, men fyrireikararnir eru væl nøgdir við undirtøkuna, sum bústevnan hevur fingið.

- Veðrið helt sær ógvuliga væl stevnudagarnar, og vit høvdu rættiliga nógv vitjandi. Hvussu stórt samlaða talið av vitjandi er, vita vit ikki enn.

Hans Petur sigur, at fríggjadagin var ikki so nógv fólk inni á gólvinum, men leygardagin var nógv fólk, og sunnudagin vóru uppaftur fleiri.

Spurdur, um talið av vitjandi fer yvir 2000, heldur hann, at gestirnir vóru nógv fleiri enn so.

- Nú verður ein eftirmeting gjørd, sum fer at vísa, hvussu bústevnan vignaðist, bæði hjá okkum fyrireikarum og hjá teimum 50 fyritøkunum, sum við vóru.

Hann sigur, at soleiðis, sum framsýnararnir, ið teir hava tosað við, hava latið frætta, er væl komið burtur úr.

- Og tað er hetta, sum í fyrsta lagi var endamálið við stevnuni hesaferð - at sjálvt tiltakið skuldi eydnast væl við nógvum vitjandi og at tær fyritøkur, sum við vóru, kundu fáa nakað burtur úr.

Hans Petur sigur, at eisini tey vitjandi vístu seg at vera væl nøgd við umstøðurnar rundan um bústevnuna.

- Eg haldi, at tiltakið sum heild eydnaðist til fulnar.

Hann sigur, at tá ið tjaldið varð sett upp seinasta hósdag, var frískur vindur, og tað sá eitt sindur møtumikið út, tí dúkurin hevði hug at larma ímóti konstruktiónini.

- Men tíbetur blíðkaði hann veðrið, soleiðis at eingir trupulleikar vóru av hesum, tá ið stevnan læt upp fríggjadagin.

Hans Petur vísir á, at konstruktiónin, sum ber tjaldinum uppi, er sterk og fer ongan veg, men hann ivast í, um tjaldið hevði verið so væl egnað, um nógvur vindur stóð á.

- Men hetta er avgjørt ein góð loysn um summarið, tá ið veðrið er gott, sigur hann.

Í tjaldinum vóru 20 av teimum tilsamans 45 básunum.

## Avrigging

Tá ið vit tosaðu við Hans Petur mánamorgunin, vóru teir í holt við at rigga av aftur.

- Flestu básarnir vórðu tiknir niðuraftur í gjárkvøldið og síðstu nátt, og tá ið dagurin í dag er av, trúgvi eg, at alt er ruddað burtur aftur.

Hann sigur, at summir framsýnarar høvdu timburmenn við sær, og teir vóru eisini í holt við at taka niður, tá ið vit frættu.

- Tjaldið er ikki komið niðuraftur enn, men tað verður tikið niður í dag og í morgin, sigur Hans Petur Ellingsgaard.

Spurdur, hví fyrireikararnir ikki høvdu eitt hvørt skipað undirhald á bústevnuni, sigur hann, at ymiskar meiningar eru um, hvønn týdning hetta hevur á eini slíkari stevnu.

- Men tað var nú ikki sørt av undirhaldi kortini. Alex Bærentsen og Terji Vestergaard, sum vóru við á básunum, upptraðkaðu einar fýra ferðir og undirhildu við sangi og tónleiki.

Hans Petur sigur, at tað var við vilja, at einki skipað undirhald var á bústevnuni.

- Vit hildu, at framsýnararnir og tey, sum vitjaðu framsýningina, skuldu fáa høvi at konsentrera seg um tað, sum stevnan hevði at bjóða. Vit vildu ikki "lokka" fólk í høllina fyri undirhaldi skyld, men við tí, teir mongu framsýnararnir høvdu at vísa fram, sigur Hans Petur Ellingsgaard at enda.




# Felagið Vágar

**Lýsir eftir fólki til kunningarstovuna og kunningardiskin í Vágum**

Í sambandi við at Felagið Vágar yvirtekur kunningardiskin á flogvøllinum, verður hervið lýst eftir tveimum fólkum í fulltíðarstarvi til at byrja 22. apríl ella skjótast til ber. Annað starvið verður á kunningardiskinum burturav, meðan hitt verður býtt millum kunningardiskin á flogvøllinum og kunningarstovuna í Miðvági. Viðmerkjast skal at talan er um skiftandi arbeiðstíðir.

**Arbeiðsøki**
Arbeiðið á kunningarstovuni umfatar millum annað:

- at vegleiða ferðafólk
- at vísa á gistingar-, útferðar- og samferðslumøguleikar í Føroyum
- at útflýggja ferðaseðlar
- at umsita tax-free kvittanir

Arbeiðið á kunningarstovuni umfatar millum annað:

- at selja útferðir hjá ferðavinnuni í Vágum
- at taka sær av bókhaldi felagsins
- at umsita útleigan av summarhúsum v.m.

**Førleikar**
Umsøkjarin skal vera fyrikomandi og hava góðan málkunnleika. Royndir innan ferðavinnu og aðrar tænastuvinnur er ein fyrimunur, men ikki nøkur treyt. Somuleiðis skal umsøkjarin hava teldukunnleika á brúkarastøð. Tann, ið settur verður til at arbeiða partvís á kunningarstovuni, skal helst hava royndir við bókhaldi.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Terja Nielsen, kunningarleiðara, tlf. 333455 ella 213455.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til Felagið Vágar, 370 Miðvágur og vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 11. apríl kl. 12.00.



# Frá Føroya Arbeiðarafelag

Boðað verður til fundar fyri allar dagrøktarmammur, ið arbeiða innan øki hjá Føroya Arbeiðarafelag.

Fundurin verður mikukvøldið 9. apríl 2003 kl. 18.30 í hølum Føroya Arbeiðarafelags, Tjarnardeild 7.

Fundarskrá: Sáttmálaviðurskifti.

**Føroya Arbeiðarafelag**



Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo



# Starvsfólk til útibólk

Verkstaðið Vón er ein vardur verkstaður fyri vaksin menningartarna fólk. Vit sóknast eftir einum starvsfólki til ein útibólk, sum eftir ætlan skal byrja 1. mai ella eftir nærri avtalu. Talan er um eina fyribilssetan fram til 1. januar 2004. Starvið verður sett eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Útibólkurin verður eitt tíðaravmarkað royndartilboð til verandi og komandi arbeiðsfólk á verkstaðnum.

Tann sum settur verður skal saman við verandi starvsfólkum, skipa ein tryggan, skipaðan og mennandi gerandisdag fyri arbeiðsfólkini. Arbeiðsuppgávan verður m.a. at viðlíkahalda urtagarðar, økir og bygningar undir Serforsorgini.

Týdningur verður lagdur á, at umsøkjarin hevur handalig evni, hevur áræði at ganga nýggjar leiðir á pedagogiska økinum, hevur evni og vilja at samstarva á øllum økjum. Arbeiðsroyndir innan serøkið er ein fyrimunur.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á telefon 314288 lokal 10 ella á fartelefon 214288. Skrivlig umsókn, við prógvum, viðmælum v.m. skal vera okkum í hendi innan 15 apríl 2003.

**Verkstaðið Vón**
**Postsmoga 2003**
**Fo-165 Argir**



Vit gera alt
URTAGARÐSARBEIÐI

• Grasvøllir • Planting • Viðlíkahald
• Seta gravsteinar upp v.m.
• Gera tún við flisum ella oljugrúsi
• Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.

Spyr - tað kostar einki!

Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta

Fa. SÍMUN DALSGAARD
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 28 21 00 • Fax 32 04 78



**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Laboratoriið í Tórshavn

er stongt **14., 15. og 16. apríl** 2003.

# Laboratoriið í Runavík

er stongt **15. og 22. apríl** 2003.



# Pedagogur til Sambýlini á Mýrini

Innan Almannamálaráðið og stovnum undir tí, við tænastu inntil víðari á Sambýlinum á Mýrini 4-6 í Hoyvík, er eitt pedagogstarv leyst til setan 1. mai 2003 ella eftir nærri avtalu.

Starvið verður sett eftir sáttmálum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag fyri tænastumannasettar pedagogar, lønarstigini 24,25,27,28,30 og 31.

Sambýlini á Mýrini eru heim hjá tíggju vaksnum menningartarnaðum fólkum, sum krevja hjálp og vegleiðing í gerandisdegnum. Talan verður um dag, kvøld og náttarvaktir.

Týdningur verður lagdur á, at umsøkjarar hava fakliga vitan, hava góð samstarvs- og innlivingarevni og eru áhugaðir í at útbúgva seg meira. Arbeiðsroyndir innan serøkið er ein fyrimunur.

Bert fólk, sum hava lokið námsfrøðiligt prógv ella líknandi prógv verða sett sum pedagogar, men um ikki pedagogur verður settur, so verður starvið sett tíðaravmarkað við hjálparfólki, sett eftir hjálparfólkasáttmálanum.

Meira fæst at vita við at venda sær til varaleiðaran á telefon 31 1478 ella 21 9958. Umsóknarfreistin er 15. apríl 2003 og skulu umsóknirnar sendast til:

**Sambýlini á Mýrini**
Att. Varaleiðarin
Á Mýrini 4-6
Fo-188 Hoyvík



# Avloysari fyri stuðulsfólk

Søkt verður eftir 1 avloysara fyri stuðulspedagog til 6 ára gamalt barn í Klaksvík, fyribils í 3 mánaðir, at byrja 01. mai 2003.

Arbeiðið hjá stuðlinum er at stimbra barnið málsliga, sosialt og annars gera dagin innihaldsríkan. Arbeiðið er fyri tað mesta á barnagarðsstovu.

Arbeiðið er í tøttum samstarvi við familjuna, stuðulsráðgevan og barnagarðin.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna og er fyribils til 1. august 2003.

Ynskiligt er at tann, ið settur verður, hevur hóskandi fakliga útbúgving ella royndir.

Setan sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til stuðulsvegleiðaran Jórun Niclasen á tlf. 410000.

Umsóknir saman við møguligum avritum av prógvi verða at senda til:

**Klaksvíkar kommunu**
Barnaverndarnevndina
Postboks 2
FO-700 Klaksvík

í seinasta lagi 22. apríl 2003.